Vit eru framvegis bangin fyri skriðjulopi

Í september mánaða 2000 fingu húsini hjá Victor og Gunnleyg Dánjalsson úr Klaksvík stóran skaða av skriðulopi. Nú hálvt annað ár seinni stúra tey framvegis, tá tað regnar illa

SKRIÐULOP
Solby A. Eliasen

Ótespuligt sá tað út, tá skriðjan rakti húsini.

Klaksvík:
- Vit eru framvegis bangin, men tað batnar hvønn dag, sigur Victor.

- Vit vóru úti úr húsinum í umleið ein mánaða, og vit søgdu, tá vit fluttu inn aftur, at um angist kenslan ikki var batnað aftan á tað fyrsta árið, so fluttu vit. Men tað bleiv betur og tað blívur eisini betri enn.

Victor greiðir frá, at tey hildu, at tað var best at fara inn aftur í húsini sum skjótast.

Men húsini vóru so langt í frá liðugt í standgjørd, tá tey fóru inn aftur. Tey svóvu ta fyrstu tíðina í stovuni, meðan kømurni, sum fóru illa, vórðu gjørd í stand. Tann eini skilaveggurin í einum kamari flutti seg einar fimm sentimetrar, og Victor sigur, at rúturin í tí kamarinum fór í knús.

- Vit kunnu bara vera takksom fyri at dóttirin, sum eigur tað kamarið ikki sat inni har tá. Tað er púra vist, at hon hevði ikki yvirlivað trýstið, sum var inn gjøgnum rútin og móti skilavegginum.

Victor sigur, at tað var best fyri Gunnleyg og seks ára gamla Páll,sum vóru inni, tá tað leyp, at tey fóru innaftur sum skjótast.

Drongurin var sum vera man púra frá sær sjálvum teir fyrstu dagarnar aftaná. Hann sat í bilinum saman við einum vinmanni og bíðaði eftir mammuni, tá tað leyp. Teir sóu alla evjuna renna út av takinum á húsinum og niður á bilin.

- Hann var sera bangin dagarnar aftaná, sigur Victor.

- Bara tað minsta ljóðið, so kom hann rennandi inn til okkum.

Páll er í dag átta ára gamal og so við og við komin yvir ræðuliga hendingina. Men Victor sigur, at tað sást enn á honum við hvørt, at hann er fjálturstungin.

300 tons av móru uttanfyri

Victor sigur, at teir fyrstu dagarnar aftaná fóru við at lempa inni í húsinum og vaska.

- Tað var heilt ótrúliga torført at vaska, tað var sum tað bara vaks. Tað bleiv við at vera skitið inni.

Hann sigur eisini, at tey fingu sera nógva hjálp alla staðni frá.

- Tað var stórarbeiði at rudda upp aftur bæði inni og úti, sigur Victor.

- Teir koyrdu eini trý hundrað tons av móru út úr túninum hjá okkum, greiðir hann frá.

Kommunan gróv eina veit umleið 30 til 50 metrar omanfyri húsinum til at beina vatn burtur. Tað bleiv við at regna illa dagarnar aftan á skriðulopið og alt vatnið savnaðist uttanfyri hjá Victor og Gunnleyg. Veitin er nóg stór til at kunna steðga einum steini.

Íbúðin í kjallaranum fór ringast

Í kjallaranum hjá Victor og Gunnleyg var ein íbúð, áðrenn skriðulopið, men hon fór so illa, at alt mátti gerast av nýggjum.

- So vit tóku avgerð um, at gera kømur og eina stovu í staðin, so um tað regnar illa onkran dagin, og vit eru ørkymlað av tí, so húsast vit bara í kjallaranum. Tað er ein trygg kensla, sigur Victor.

Nógv at takka fyri

Hann sigur, at tey ofta hava hugsað um skalvalop tíðina áðrenn skriðulopið.

- Vit høvdu aldrin ímynda okkum at hatta fór at henda. Vit hava ofta tosað um skalvalop, og eg vil ikki leggja skjól á, at vit verða ørkymlað, tá nógvur kavi legst.

- Vit hava nógv at vera takksom fyri og eg veit, at tað er bert einum fyri at takka, at alt spældi so væl av. Tí, hví skuldi eg ringt heim og biðið Gunnleyg farið út úr húsinum tíggju minuttir, áðrenn tað leyp? Tað havi eg ongantíð gjørt áður.

- Uttan at taka nakað frá nøkrum øðrum, má eg nevna Hans Jacob, grannan hjá okkum. Í tí ringastu løtuni, sum var meðan eg enn ikki visti hvar Gunnleyg og børnini vóru, var hann hjá mær alla tíðina. Og tað haldi eg vera alla æru vert. Hann hevði jú eisini sítt at hugsa um, sigur Victor Dánjalsson.

Victor sigur, at fólk hava verið heilt einastandandi hjálpsom. Onkur fór enntá so langt sum at vilja býta um hús við tey. Men Victor og familja hansara vilja fegin vera búgvandi í húsinum.

Fyritøkan hjá Elmar Zachariassen:

Fingið uttanbýarkoyringina hjá Føroya Bjór

Frá hálvum apríl fer fyritøkan hjá Elmari Zachariassen í Klaksvík at hava alla uttanbýarkoyringina um hendi

FØROYA BJÓR
Solby A. Eliasen

Klaksvík:
- Vit hava skrivað undir sáttmála við Elmar Zachariassen, sum kemur í gildi fimtanda apríl, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór.

Hesin sáttmálin hevur við sær, at fyritøkan hjá Elmari skal koyra til allar sølur hjá Føroya Bjór í landinum. Teir skulu tó bert koyra til sølurnar og ikki inni í bygdunum ella býunum.

Strandfaraskip Landsins hevur annars tikið sær av tí.

- Vit eru sera væl nøgd við tænastuna hjá Strandferðsluni, men tað er sera dýrt, sigur Einar, sum vónar, at tænastan hjá Elmari ikki fer at standa aftanfyri SL.

- Ongantíð betur um tænastustøðið hækkar, sigur hann.

Tað fara sera nógvir trailarar um vikuna úr Klaksvík og kring alt landið við vøru frá Føroya Bjór, so talan er um eina stóra øking í koyring hjá Elmar Zachariassen.

Einar sigur, at onkrir av bilunum hjá Strandferðsluni hava havt reklamuskelti frá Føroya Bjór á.

- Tað er væl møguligt at skelti verða sett á onkran bil hjá Elmar Zachariassen, men tað er sera kostnaðarmikið at gera, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór.

Gevið mammu og pápa frí á páskum - komið út og etið!

PÁSKATILBOÐ Á HOTEL HAFNIA
leygarkvøldið 30. mars, sunnudagin 31. mars & mánadagin 1. apríl

SERTILBOÐ
Rækjubland ella klár súpan við bollum 35,-
Heimabakað breyð afturvið.
Leskiligt lambstjógv 120,-
við kókaðum og brúnum eplum, reyttkáli og lambasós.
Ísdessert 35,-
3 rættir bara 158,-

BÚFF TILBOÐ
Flógvur innbakaður laksur v/limesós 35,-
Borðreitt á salati.
Frítt val millum
· enskan búff,
· franskan búff ella
· piparbúff 155,-
við tilhoyri
2 rættir bara 175,-

Harumframt bjóða vit leskiliga luksus-matskrá

Sunnud. og mánad. til kl. 17.00
Barnabuffet 2-12 ár 55,-
13-16 ár 78,-

leygarkvøld frá 18.00 - 21.30
STÓR PÁSKABUFFET
á 185,-

HAFNIA LOUNGE
Kaffi og køka 35,-

Verið vælkomin at bíleggja borð frammanundan!

Hotellið í Miðbýnum
Tel 31 32 33
HOTEL HAFNIA

Hotel Hafnia um
PÁSKIRNAR
Skírisdag, langafríggjadag
leygardag, páskadag og 2. páskadag:

Kamar og morgunmatur
Einkultkamar kr. ....500,- fyri hvønn/eina nátt
Dupultkamar kr. ....350,- fyri hvønn/eina nátt
(Børn upp til 12 ár ókeypis)

RESTAURANT HAFNIA
&
HAFNIA LOUNGE
eru opin á páskum,
men afturlatin skírisdag og langafríggjadag, !
Sjá serlýsing fyri matskrá okkara
leygardag, Páskadag og 2. Páskadag !

Gleðiligar páskir !

Hotellið í miðbýnum
Tel 31 32 33 • Fax 31 52 50
E-mail: hafnia@hafnia.fo
HOTEL HAFNIA

i arøktin u uroy

u ar riu avloysarar

júkrasystrar
ilsuatstø ingar
ilsu j l arar i a j l arar

Søkt verður eftir summarferiuavloysarum at arbeiða í skiftandi vaktum í Heimarøktini í tíðarskeiðinum 27. mai til 30. september.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til økisleiðaran Jastrid Nielsen tlf. 373907.

Løn og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi verður at senda til:

i arøktin
Økisskrivstovan
900 Vágur

Umsóknarfreistin: 19. apríl 2002.

unng r u løgtingsvali

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at vallistin til løgtingsvalið tann 30. apríl 2002 liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari avgeiðslutíð frá mánadegi 25. mars 2002 til mikudagin 3. apríl 2002.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan ella, at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 7. apríl 2002.

Tvøroyri, hin 25. mars 2002.

TVØROYRAR KOMMUNA

unng r

Tað verður gjørt kunnugt, at vallistarnir til løgtingsvalið, sum verður tann 30. apríl 2002, liggja frammi til alment eftirlit á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð frá týsdegnum 25. mars 2002 til hósdagin 4. apríl 2002, báðir dagar íroknaðir. Vallistin á Hellunum liggur frammi hjá Eli Jensen í sama tíðarskeiði.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan, ella at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera býráðnum í hendi í seinasta lagi týsdagin 9. apríl 2002.

Fuglafjørður, tann 25. mars 2002.
Fugla jar ar b r

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg